# Kaupthing gott ársúrsliti

**Kaupthing Føroyar hevði í fjør eitt yvirskot áljóðandi 1 mió krónur. Stjórin fegnast um gongdina**

ÁRSROKNSKAPUR
*Heri á Rógvi*

Í ársroknskapinum fyri Kaupthin Føroyar stendur at lesa, at fyritøkan fyri árið 2001 hevði eitt yvirskot áljóðandi 1,013 mió kr. Hetta fegnast stjórin í Kaupthing, Peter Holm, eisini um. Nevndin góðkendi saman við aðalfundinum roknskapin hin 6. februar.

–Vit eru enn eitt rættiliga nýtt felag. Í londum rundanum okkum er tað vanligt, at nýstovnaði feløg hava eitt tveysifrað millióna undirskot eftir so stutta livitíð. So vit eru ógvuliga fegnir, sigur Peter Holm.

Tað var 1. mars 2001, at virksemið hjá Kaupthing Føroyar formliga fór ígongd. Tá kastaðu Føroya Sparikassi og Kaupthing Bank saman í Kaupthing Føroyar, Føroya Virðisbrævamarknaður. Frammanundan hevði Kaupthing Bank virkað í Føroyum, men roynt varð heldur at virkað eftir hesum nýggja leistinum. Virksemið hjá Kaupthing Føroyar snýr seg fyrst og fremst um virðisbrøv, t.e. keyp og søla, ráðgeving og ognarrøkt.

–Hóast serliga partabrævamarknaðirnir sum heild royndust svikaligir í 2001, var talan um ein lutfallsliga stóran vøkstur í virðisbrævaíløgum gjøgnum Kaupthing Føroyar farna árið. Við serligu umstøðunum í huga er hetta nøktandi. 31. desember 2001 umsat Kaupthing Føroyar virðisbrævaíløgur fyri viðskiftafólk fyri eitt virði á umleið 1,1 mia. kr. Størsti parturin av hesum viðisbrævaíløgum, og samstundis eisini størsti parturin av vøkstrinum í farna árinum, eru íløgur í donsk stats- og realkredittlánsbrøv, skrivar Kaupthing m.a. í ársfrágreiðingini.

*Kaupthing Føroyar hevði eitt yvir um milliónina í 2001.*



Valskrá Fólkafloksins:

# KT-vinnan sjálvberandi, ferðavinnan stuðlast

**Sjálvberandi fiskivinna og KT-vinna heldur Fólkaflokkurin vera alneyðugt. Tað almenna skal ganga undan í at nýa kunningartøkni. Hinvegin eigur ferðavinnan at stuðlast meira fyri at bøta um møguleikarnar fyri íløgum**

LØGTINGSVALIÐ
*Heri á Rógvi*

Fólkaflokkurin hevur lagt fram sína valskrá til løgtingsvalið 30. apríl. Ein faldari verður í tí sambandinum borin út í hvørt hús.

Slagorðini eru treyst, trygd og trivni, og millum yvirskriftirnar er vinnulív í fremstu røð.

Fólkaflokkurin hevur eisini tikið teir smærru vinnubólkarnar við í sína valskrá. Millum annað KT-vinnan verður umrødd.

–Búskapurin má fjøltáttast, og KT-vinnan skal tí gerast fíggjarliga sjálvberandi. Hon skal kunna menna, virka og selja dygdarvørur og tænastur á heimamarknaðinum og til útflutnings og á tann hátt skapa avkast í fríari altjóða kapping, stendur at lesa í valskrá Fólkafloksins.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður fyri Fólkaflokkin, sigur, at teirri politikkur á KT-økinum í stóran mun avspeglar tann politikk, ið landsstýrið hevur ført. Hann vísir samstundis á, at politikkurin hjá Fólkaflokkinum er í tráð við álitið um KT-vinnu, sum Vinnumálastýrið hevur latið úr hondum.

Nógva kjakið um fjarskiftisøkið hevur eisini vakt ans hjá Fólkaflokkinum, og hetta verður eisini nevnt í valskránni.

–Fyri at nøkta tørvin á fjarskifti verða javnbjóðis fortreytir skaptar fyri frælsari kapping á fjarskiftisøkinum, stendur at lesa. Ætlanin er harumframt, at tað almenna skal ganga undan at nýta kunningartøkni.

### Ferðavinnan

Fólkaflokkurin mælir til, at tað almenna tekur ein størri leiklut í at vekja áhugan fyri ferðavinnu í Føroyum.

–Landsins ferðavinna er arbeiðskrevjandi og virkar sum útflutningsvinna, tí hon dregur fremmant gjaldoyra til landið. Talið á ferðafólki kann økjast munandi uttan tilsvarandi íløgukrøv, tí partar av undirstøðukervinum longu eru til staðar, sigur altso Fólkaflokkurin.

Flokkurin er av teirri áskoðan, at tað, ið kann stimbra ferðavinnuna og gera hana kappingarføra við ta í grannalondunum, eigur at stuðlast.

Eisini verður mælt til at lækkað punktgjøldini á vørum, ið kunnu draga ferðafólk til Føroya.



*Vinnan skal vera í fremstu røð hjá Fólkaflokkinum, og hetta merkir m.a., at KT-vinnan og Ferðavinnan fáa betraðar karmar.*

*Mynd: Jens Kristian Vang.*

# Fólkaflokkurin hava eykalandsfund



*Stórur áhugi var fyri eykalandsfundinum hjá Fólkaflokkinum.*

**Stóru áhugi var fyri eykalandsfundinum hjá Fólkaflokkinum, ið varð hildin í Havn um vikuskiftið**

LANDSFUNDUR
*Heri á Rógvi*

Hóast tað ikki er langt síðani, at Fólkaflokkurin seinast hevði landsfund, so høvdu hevði flokkurin aftur landsfund í Havn um vikuskiftið. Frá kl. 10 á morgni til kl. umleið 17.30 seinnapartin leygardagin savnaðust fólkafloksfólk í Pálsstovu í Havn. Ein sokallaður eykalandsfundur, ið varð fyriskipaður við løgtingsvalinum fyri eygað.

Áhugin var rættiliga stórur. Um hundrað fólk vóru í miðal til staðar á fundinum leygardagin. Fremsta umrøðumálið var sjálvsagt løgtingsvalið. Valevnini hjá Fólkaflokkinum vóru flest øll til staðar, og tey fingu eisini høvi til at siga sína hugsan um ymisk mál. Valevnini hittust eisini øll fyri nøkrum vikum síðani.

Fólkaflokkurin hevur gjørt sína valskrá til løgtingsvalið, og hon fekk rættiliga nógva umrøðu á fundinum.

Fundurin varð fyri tað nógva fyriskipaður á tann hátt, at ein landsstýris- ella løgtingsmaður hjá flokkinum legði fram um eitt evni í einari 20 minuttir. Síðani fingu áhoyrararnir høvi til at gera viðmerkingar.

Tosað varð serligu um tey størru evnini. Ovast á dagsskránni var tjóðskaparmálið og vinnan í síni heild.

Óli Breckman sigur, at Fólkaflokkurin er samdur innanhýsis, um hvørja leið rættast er at ganga á sjálvstýrisleið. Sum heild helt hann, at talan hevði verið um ein sera góðan fund.

Eykalandsfundurin endaði við einari veitslu um kvøldið.



*Tað var ikki ein mangul upp á kend andlit á landsfundi Fólkafloksins, sum varð hildin um vikuskiftið.*



Nes kommuna í stórari menning:

# Ætlar at gera fleiri íløgur í havnalagið

**Bygdarráðið hevur samtykt at kanna, hvussu nógv tað kostar at gera 25 metrar av atløgusíðu norður úr ferjuleguni við Toftagjógv. Eisini er samtykt at kanna kostnaðin av eini atløgusíðu á eystara armi í Oyrunum, soleiðis at trolbátarnir møguliga kundu ligið har.**

Havnabygging
*Vilmund Jacobsen*

Vinnulívið í Nes kommunu hevur verið í stórari menning seinastu árini, og serliga er tað á havnalagnum, henda menning er farin fram. Nýggj virkir eru bygd, sum krevja nógv pláss, og hetta setir síni krøv til kommununa um eitt nøktandi havnalag, bæði við upplandi og bryggjukanti.

Síðan Fiskamarknaður Føroya byrjaði sítt virksemi á Toftum, er nógv hent á havnalagnum.

Tvey nýggj fiskavirkir eru bygd sunnanfyri virkið hjá Fiskavirking, og sunnanfyri bygningin hjá uppboðssøluni, hevur Kassamiðstøðin bygt ein stóran bygning. Aftrat hesum er ein maskinverkstaður bygdur millum tey bæði nýggju fiskavirkini, Vallhalla og Snodd.

### 25 metrar aftrat

Súni í Hjøllum, formaður í teknisku nevnd hjá kommununi, sigur, at hóast havnalagið er munandi útbygt seinastu árini, er tørvurin so stórur, at bygdaráðið nú hevur samtykt at kanna, hvussu nógv tað kostar at gera 25 metrar av atløgusíðu norður úr verjuleguni við Toftagjógv.

- Vit hava eisini samtykt at rudda økið sunnanfyri virkið hjá Fiskavirking, planera, seta ljós upp og asfaltera økið, so koyrast kann oman á bryggjuna sunnanfyri virkið.

Súni í Hjøllum sigur, at bygdaráðið eisini hevur samtykt at kanna, hvussu nógv tað kostar at gera atløgusíðu á eystara armi í Oyrunum og dýpa niður á 3,6 metrar, soleiðis at trolbátarnir møguliga kundu ligið har.

### Planering og asfalt liðugt í summar

Formaðurin í teknisku nevnd sigur, at øll planering og asfaltering á havnalagnum verður gjørd liðug í summar, soleiðis at viðurskiftini kunnu skipast betur.

- Vit hava stívliga 3 miljónir krónur at arbeiða við á havnalagnum í ár, sigur Súni í Hjøllum



*- Hóast havnalagið á Toftum er munandi útbygt seinastu árini, er tørvurin so mikið stórur, at kommunan arbeiðir við nýggjum útbyggingarætlanum, sigur formaðurin í teknisku nevnd, Súni í Hjøllum.*

# 17 bátar róð út av Oyndarfirði

**- Teir fyrstu dagarnar gekk skjótt at sleppa av við fiskin, men síðan gingu kassarnir undan. Í seinastuni er fiskurin blakaður upp úr bátinum við hond og koyrdur í smár í smáar kassar. Tað tekur sína tíð og kann vera strævið eftir langan og strævnan útróðrardag, sigur Louis Houmann.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Tað er nógv lív í norðanfyri í norðhavstíðini. Bæði á Eiði, Haldórsvík og Oyndarfirði liggja nógvir útróðrarbátar í februar og mars. Soleiðis er eisini í Klaksvík, men har eru so nógvir bátar alt árið, at tað merkist kanska ikki so nógv, um nakrir koma aftrat hesa tíðina av árinum.

Louis Houmann, sum var inni á gólvinum á Sosialinum í Saltangará í endanum av síðstu viku, sigur, at 17 bátar hava róð út av Oyndarfirði í vár, eitt nú fleiri bátar úr Suðuroy, sum plaga at royna við snellu norðanfyri í vártíðini.

Sum skilst, eru tað serliga útróðrarmenn av Tvøroyri og Perkeri, sum leita sær til Oyndarfjarðar.

- Men nú eru bátarnir einir 12 í tali. Tveir bátar úr Suðuroy fóru miðskeiðis í síðstu viku, og tríggir aðrir úr Suðuroy fóru dagin fyri. Teir fyrri ætlaðu sær at royna í Sandshavinum, áðrenn teir leggja leiðina aftur til Suðuroyar, sigur Louis, sum sjálvur annar hevur verið onkran túr við útróðrarbátinum, Báruni.

Louis hevur annars verið bóndi í nógv ár, men eftirhondini gjørdist hann troyttur av hesum og fekk hug at royna okkurt annað.

### Ikki farið av tíð

- Eg haldi ikki, at norðhavstíðin er av enn. Í gjár fekk onkur bátur heili 5.000 pund. Men fiskiskapurin hendan dagin var misjavnur, tí summir bátar fingu lítið og einki.

Louis sigur, at tað er ymiskt, hvussu fiskurin tekur.

- Nógv sild er í fiskinum, og hevur hann nóg mikið fyri kjaftin, er ikki vist, hann hevur so stóran áhuga í beitunum. Tað skrivar nógv á loddinum, men toskurin tekur í "rendum", sum teir plaga at taka til. Annars helt onkur fyri um dagarnar, at várfiskurin var ikki komin fyrr enn nú.

Louis sigur, at útróðrarbátarnir løgdu seg á Oyndarfjørð tíðliga í februar.

- Tað hevur ikki viðrað nakað serligt, og nú er nógv útliðið, men útróðrarmenn siga, at okkurt várið hava teir fingið fisk út í apríl mánaða.

### Strævin landing

Fiskurin, sum kemur uppá land í Oyndarfirði, fer í bili út á Fiskamarknaðin á Toftum.

- Teir fyrstu dagarnar gekk skjótt at sleppa av við fiskin, men síðan gingu kassarnir undan. Í seinastuni er fiskurin blakaður upp úr bátunum við hond og koyrdur í smáar kassar. Tað tekur sína tíð og kann vera strævið eftir langan og strævnan útróðrardag, sigur Louis Houmann.

*- Einir 5 bátar úr Suðuroy eru rýmdir av Oyndarfirði og eru farnir aðrastaðni at royna, sigur Louis Houmann, sum hevur verið bóndi í nógv ár, men nú er farin at rógva út.*

